MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegi 3
100 Tórshavn
Stílað Mentanarnevndini og Trivnaðarnevndini

Dagfesting: **22. februar 2016**
Máltal.: **16/00200-7**

# Ivamál viðvíkjandi nøkrum av ætlaðu lógarbroytingunum í løgtingsmálum nr. 19 og 21/2015

Sambært eini vanligari tulking av hugtakinum "ægtefæller" í galdandi føroyskari lóggávu, er hjúnalag ein skipan, ið einans kann vera millum persónar, ið ikki eru av sama kyni. Fyri at verða fevndur av hjúnabandshugtakinum, er tað uttan týdning, um hesi eru gift borgarliga ella kirkjuliga. Fáa persónar av sama kyni loyvi til at giftast – borgarliga ella kirkjuliga – avleiða hesi øll tey rættindi og skyldur, ið eru galdandi fyri hjúnafelagar, uttan so at kynsligur munur er tilskilaður í lóggávuni annars, við at hugtøk sum eitt nú "maður" og "kona", "af forskelligt køn" ella "móður" og "faðir" o.tíl. verða brúkt.

Sagt skal vera frá, at signing av hjúnabandinum í sjálvum sær hevur ikki nakran borgarligan rættarvirknað og krevur sostatt ikki lógarheimild. Onnur trúarsamfeløg kunnu sostatt velja at hava serligar reglur fyri at signa borgarlig hjúnaløg, sbr. Folketingstidende 1968-69, tillæg B, sp. 1897, sum sipað er til í Ægteskabsloven med kommentarer af Mogens Hornslet, Svend Danielsen og Jaques Hermann, Juristforbundets Forlag 1974, bls. 67. Hinvegin krevur ein avmarking í møguleikanum at fáa hjúnabandið signað allarhelst lógarbroyting, tí talan er um eitt inntriv í ein møguleika, ið longu er skipaður við lóg, sbr. § 14, stk. 2 í galdandi hjúnabandslóg.

Fólkakirkjan hevur eittans ritual til at *signa* borgarliga vígslu. Ritualið er frá 9. november 1938 og er greidliga orðað til at signa hjúnalag millum mann og konu, eins og fólkakirkjan ikki hevur ritual til at *víga* tvey av sama kyni. Soleiðis sum rættarstøðan í Føroyum er í dag, hevði sóknarprestur tí framt grovt tænastubrot, um hann hevði signað hjúnalag millum tvey av sama kyni, tí hann hevði framt halgigerð, sum kirkjan ikki hevur løggilt ritual til ("ritualselvtægt"). Við verandi rættarstøðu á hjúnabandsøkinum ber sostatt ikki til at víga ella signa tveir persónar av sama kyni í fólkakirkjuni.

Um lógin um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni verður broytt samsvarandi uppskotinum til broytingarlóg, verður fyri tað fyrsta eitt rættiliga greitt ósamsvar millum tað, sum kirkjan, sambært kirkjuskipanini, hevur møguleika til at gera viðvíkjandi signing, og § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini, tí hugtakið "*ægtefæller*" verður við broytingaruppskotinum víðkað til eisini at fevna um borgarligt hjúnaband millum persónar av sama kyni, og sostatt kunnu persónar av sama kyni sambært § 14, stk. 2 í verandi hjúnabandslóg fáa teirra hjúnaband signað:

"*Ægtefæller kan få et ægteskab, som er indgået ved borgerlig vielse, kirkeligt velsignet af en præst i folkekirken.*"

Løgtingslógin um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni fer tá at avmarka møguleikan hjá summum hjúnum at fáa hjúnalagið signað kirkjuliga, meðan galdandi hjúnabandslóg gevur øllum hjúnum henda møguleika.

Fyri tað næsta er tað ein formligur vansi við fyriliggjandi teggju av broytingaruppskotum, at uppskotið til broyting í lógini um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni er at lóggeva við løgtingslóg innan málsøki, ið er *felagsmál*. Hetta tykist vera í ósamsvari við galdandi stjórnarrætt, tí at heimildin til at regluseta møguleikan til at fáa borgarligt hjúnalag signað kirkjuliga fylgdi ikki við yvirtøkuni av fólkakirkjuni. Hesin parturin av kirkjuliga virkseminum er skipaður í hjúnabandslógini, ið er felagsmál. Felagsmál verða relgusett við løgskipanum, ið byggja á ríkislóggávu, ella (um stórur munur er á ríkislóggávuni og tí, sum skal galda í Føroyum) við serstøkum fólkatingslógum, ið bara galda fyri Føroyar. Sostatt er ætlanin um at gera serliga áseting um kirkjuliga signing í føroyskari lóggávu í andsøgn við viðurskifti, ið eru tryggjað í felagsmálslóggávu, ið fellir uttanfyri málsræðið hjá Løgtinginum at lóggeva um, sbr. § 4, stk. 1 í heimastýrislógini og § 1, 1. pkt. í stýrisskipanarlógini, har føroyska lóggávuvaldið er treytað av yvirtøku av avvarðandi øki, sum í hesum føri er hjúnabandslógin, ið er partur av málsøkinum húsfólka- persóns- og arvarættur.

Ein máti at koma uttanum henda trupulleika er at seta orðini ", *af forskelligt køn,*" inn millum orðini "*Ægtefæller*" og "*kan*" í orðingini í § 14, stk. 2, 1. pkt. í hjúnabandslógini, soleiðis sum skotið varð upp í løgtingsmáli nr. 53/2013: Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning:

"*Ægtefæller, af forskelligt køn, kan få et ægteskab, som er indgået ved borgerlig vielse, kirkeligt velsignet af en præst i folkekirken.*"

Slík broyting hevði somuleiðis havt við sær, at føroyska lógin um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni ikki varð brúkt til at skipa hesi viðurskifti, og samstundis hevði hetta gjørt, at hjúnabandslógin hvørki álegði fólkakirkjuni fleiri ella færri skyldur enn nú. Hetta hevði møguliga eisini samsvarað betri við § 1 í uppkostinum til nýggja hjúnabandslóg, ið ásetur:

"*Loven finder anvendelse på ægteskab mellem to personer af forskelligt køn og borgerligt ægteskab mellem to personer af samme køn.*"

Sagt skal vera frá, at staðilig heimild tykist ikki at vera í donsku upprunalógini fyri í kongligari fyriskipan fyri Føroyar at avmarka § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini mótvegis ávísum samfelagsbólkum, men tí viðvíkjandi er støðan ikki øðrvísi enn tað, ið longu fylgir av uppskotnu avmarkingini av rættindum sambært § 1 í uppskotinum, sum lýst er omanfyri. Eisini kunnu vera ávís ivamál í mun til evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) grein. 12 (rætturin til hjúnaband) (evt. grein 9 (átrúnaðarfrælsið)) samanhildið við grein 14 (forboðið móti mismuni viðv. EMRS-vardum rættindum og frælsum).

Í sama mun sum mett verður, at ein avmarking í rættinum sambært § 1 í broytingaruppskotinum møguliga er heimilað vísandi til orðingina um "serligu føroysku viðurskiftini" í upprunalógini, kann eisini verða mett, at heimild er fyri at fremja sama slag av avmarking í mun til signing

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ +298 30 65 00 • 🖷 +298 30 65 55 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

sambært § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini. Hesar heimildarspurningar munnu ríkismyndugleikarnir vera teir røttu at taka støðu til, tí at tað er í felagsmálslóggávu at hesi viðurskifti eru skipað.

Ein annar máti at komið uttanum trupulleikan við at lóggeva við løgtingslóg um viðurskifti, ið eru skipað í felagsmálslóggávu, kundi verið at strokið § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini. Sum ávíst í byrjanini, kunnu onnur trúarsamfeløg velja at hava serligar reglur fyri at signa borgarlig hjúnaløg.

Hevði § 14, stk. 2 verið strokin, hevði tað – á sama hátt sum tað er hjá hinum trúarsamfeløgunum í dag – verið upp til fólkakirkjuna, hvørt hon valdi at hava ritual til at signa borgarliga gift pør. Við hesi loysnini hevði samstundis sloppist undan einum av møguligu ivamálunum í mun til EMRS.

Vísandi til tað, sum her er ført fram, og til skriv Mentamálaráðsins til Mentanarnevndina 17-01-2016 og 19-01-2016, nevndarskjølini B og G hjá Mentanarnevndini í hesum máli, skal Mentamálaráðið mæla til, at ætlaða broytingin í lógini um at brúka kirkju og um limaskap í fólkakirkjuni ikki verður framd, tí økið innihaldsliga er skipað í felagsmálslóggávu *og*

1) At møguleikin fyri at strika § 14, stk. 2 í hjúnabandslógini verður umhugsaður, *ella*
2) At (eins og í løgtingsmáli nr. 53/2013) verður møguleikin at seta orðini ", *af forskelligt køn,*" inn millum orðini "*Ægtefæller*" og "*kan*" í § 14, stk. 2, 1. pkt. í hjúnabandslógini umhugsaður.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Bergur Berg
*fulltrúi*

/Torkil V. Rasmussen
*løgfrøðingur*

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • +298 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo